Hækkaðar skaðabøtur ...

(Framhald frá 1. síðu)

Fyrsta javning eftir hesum reglum varð 1.4. 1968, og komu endurgjøldini at verða:

	kr.
Til einkju upp til ...	45.000,—
Til barn, upp til ...	16.875,—
Barnaendurgjald lagar seg annars eftir aldri á barninum, soleiðis at yngri barn fær meira enn eldri barn	
Jarðarferðarhjálp ...	782,—
Dagpening., upp til	27.78

Avlamisendurgjald lagar seg eftir avlamisstigi og aldri á skadda, men sum dømi skal her verða tikið avlamisendurgjald til 25 ára gamlan mann:

5 pst. avlamni	gevur endurgjald upp til kr.	3.125,—	
25 pst. avlamni	gevur endurgjald upp til kr.	19.583,—	
50 pst. avlamni	gevur endurgjald upp til kr.	46.625,—	
75 pst. avlamni	gevur endurgjald upp til kr.	73.688,—	
100 pst. avlamni	gevur endurgjald upp til kr.	100.750,—	

Verður avlamisstig mett til 50 pst. ella meira, verður endurgjaldið vanliga sett til eina árliga rentu, og verður rentan í omanfyri standandi dømi:

50 pst. avlamni kr. 4.165 árliga
70 pst. avlamni kr. 6.250 árliga
100 pst. avlamni kr. 8.335 árliga

Næsta hækkingin verður 1.4. 1969, við tað at pristalið 1. januar 1969 er komið upp á 513.

Limatalið vísir fyri 1968 framgongd á øllum økjum. Samlaða framgongdin er 676 limir.

Kr. 200.000,- eru settar í serligan skaðagrunn — »katastrofu«-grunn — við tað at einki er endurtryggjað. Roynt hevur verið eftir eini tilikari endurtrygging, men tilboðini hava verið soleiðis, at ikki hevur kunnað verið tikið við teimum. Vanlukkutryggingin tekur sostatt sjálv fulla ábyrgd av øllum skaða-endurgjøldum, soleiðis sum hon higartil hevur gjørt.

Hetta kann koma at verða dýrt við teimum vaksandi endurgjøldunum, soleiðið sum hon higartil hevur gjørt.

Hetta kann koma at verða dýrt við teimum vaksandi endurgjøldunum. Um til dømis ein trolaramanning fórst, kundi tað komið at kosta um 2 milliónir kr., og ein línubátamanning frá 900.000 kr. til 1 millión kr.

Í 1968 eru útgoldnar skaðabøtur fyri tilsamans 800.845,92 kr. ella kr. 123.976,07 minni enn í 1967, hóast talið av skaðamálum er 143 í 1968 móti 125 í 1967.

Rakstrarvinningurin kr. 529.256,59 er fluttur til tiltaksgrunnin.

Ársaðalfundur Føroya Ídnaðarfelags

verður hildin fríggjadagin 9. mai 1969 kl. 20.00 á Hotel Hafnia, Tórshavn.

Dagsskrá eftir lógini:

1. Nevndin gevur frágreiðing um hitt farna árið.
2. Kassameistarin leggur fram grannskoðaðan roknskap til samtyktar.
3. Limagjaldið fyri komandi ár.
4. Val av nevnd og tveimum grannskoðarum.
5. Lógarbroytingar.
6. Ymist.

NEVNDIN

TIPPING

HB-B36. Tvørligt verður sjálvandi at meta um teir fyrstu dystirnar, tí enn hava vit ikki séð, hvat tey ymisku liðini í veruleikanaum evna.

Sambilarnir møtast í Gundadali í morgin og eftir tí, ið higartil er farið fram í ár, vænta vit sigur til HB.

TB-VB. Í seinni helvt í kappingini í fjør gjørdi VB sanniliga vart við seg, og hóast TB møtir við einum hampiliga sterkum liði — tað sóu vit í fjør — og leikar á heimavølli, vænta vit sigur til VB.

	1	x	2
HB—B36	1		
TB—VB			2
HB—B36 (ungl.)	1		
HB—B36 (dreingir)		x	
TB—VB (dreingir)			2

1 verður givið um heimaliði væntast at vinna.
x verður givið um javnleikur væntast.
2 verður givið um útiliði væntast at vinna.

Tað liði, ið fyrst er nevnt, spælir á heimavølli.

Olympos.

FLAGGIÐ ...

(Framhald frá 1. síðu)

lúta fyri sjúkuni. Hann doyði 23 ára gamal í 1920. Hann var góður vit land sítt.

Og er tað nakrastaðni tú kanst kenna teg einsamallan, so er tað í stórbyinum København. Í eini yrking sigur hann millum annað:

Heimleysur eg eri,
móðurleysur við;
ørm er leið í flatlands víðalundum,
tí mær langtar heim til tín:
í sorg- sum í gleðisstundum,
Føroyar tú ert móðir mær,
bert eg eigi heim hjá tær.

Teir ungu Føroyingarnir, sum leitaðu saman har, komu til tað úrslit, at best var at gera sær eitt krossmerki, eins og hini Norðanlondini. Eftir at talað varð aftur og fram, kom úrslitið, sum vit kenna.

Fyrstu ferð flaggað varð í Føroyum við tí upprunaliga flagginum, var tá systir Jens Olivers — Karin — giftist. Tað var 14. januar 1919, at Karin og Rasmus Tausen giftust. Ta ferðina var tað ein gleðilota. Og seinastu ferð sama flagg varð vundið á stong, var 11. juli 1952, tá bróðir Jens Olivers — Daniel Johan, varð borin til gravar, ein sorgarstund. Soleiðið hevur tað veitrað og veitrar tað enn í gleði og sorg.

Flaggið var nú vorðið gamalt og um at farast. Til tess at varveita tað, varð tað viðgjørt og sett í rammu og hongur nú í kirkjuni í Fámjin.

Fróður á morgni um flotur tú leikti sum fljótasta folin;
sóttsligin steðgaði leið og feigdini fagnaði tolin:
barst móti Beinisvørð bros, tá tú Karoni flýddi oboðin,
— leikbrøður vátta sín harm henda varða veittu tær vini;
hvíl her í heimlands mold í mildum sólseturs skini.

Soleiðis kvað Janus Djurhuus sáli.

Og neyvan mans tú síggja vakrari sjón enn sólsetur í Fámjin, sum liggur á vestursíðuni á Suðuroynni. Sjálvt hin hepnasti listamálarin er ikki førur fyri at avmynda teir litir, ið randa fjøllini eitt vakurt summarkvøld í sólsetri.

Hanna.

Arbeiði søkist

Ungur svenskari ið vitjar higar í summar at læra Føroyar at kenna, sóknast eftir fyrifallandi arbeiði.

Prentsm. v. á.

ÚTVARPIÐ

Leygardagin 26. apríl

18.30 Veðurtíðindi og tíðindi.
18.42 Harmonikan.
19.00 Myndir av mætum monnum.
19.20 Leygarkvøldspoppur.
20.00 Útvarpsleikur.
20.45 The Rabbits syngja og spæla.
21.30 Stuttsøga.
22.00 Dansur í Pálmugarði.
22.50 Víkuyvirlit.

Sunnudagin 27. apríl

14.00 Tónleikasending.
14.30 Kvøðuljómar.
16.50 Veðurtíðindi og tíðindi.
17.00 Gudstænasta.

Mánadagin 28. apríl

18.30 Veðurtíðindi og tíðindi.
18.42 Úr ymsum heraðshornum
19.00 Løtt løg.
19.30 Grammofonkonsert.

Týsdagin 29. apríl

18.30 Veðurtíðindi og tíðindi.
18.42 Barnaútvarp.
19.10 Hermann Jacobsen velur plátur.

Mikudagin 30. apríl

18.30 Veðurtíðindi og tíðindi.
18.42 Fiskivinnutátturin.
19.10 Hornmusikkur.

Hósdagin 1. mai

18.30 Veðurtíðindi og tíðindi.
18.42 Quo vadis?
6. partur av framhaldssøgu eftir H. Sienkiewicth.
Hans Thomsen umsetir.
Einar Joensen lesur.
19.10 Tónleikur fyri hálvvaksin


ROYNIÐ TYKKUM NÚ



KLOKKUGÁTA



1— 3 = tónar
4— 7 = lutir
8— 9 = longdarmál
10—12 = framvegis
1—12 = politikkarar



Yvir: 1) Asiuland 7) fá tær! 8) í potti 10) fuglamálsending 11) fiskur 14) ill 15) vaks! 16) hvíl! 18) leingist.

Niður: 2) fá tær! 3) hárskerin 4) trø 5) leggja niður 9) hol 12) frísk 13) sjúka 17) fornavn.

5 spurningar

1) Nær livdi húsfrúgvin í Húsavík?
2) Hvussu nógv egg verpur Smíril?
3) Hvør italskur býur er næststørstur?
4) Hvat er nautafon?
5) Hvør var Dionysos?

SVAR: 1) umleið 1400 2) 4 3) Milano 4) elektriskt tokuhorn 5) grikskur gróðrar- og vinguður.

TIL ÚTFYLLINGAR

Set hjáljóð í staðin fyri strikurnar, og tú fært:

1) - I - I - E - = bygd
2) - - A - - I - = bygd
3) - O - - E - I = bygd

veitst tú


AT musikktólið floyta hevur navn eftir einum italskum álli »flauta«. Hann líkist floytu av teimum nógvu andaholunum, hann hevur frá høvdinum og omaneftir hálsinum.

AT eitt fólk ongatíð skrivar sítt navn líka tvær ferðir.

AT sokkar gjørdir úr reinum silki tveita ljósið nógv betur aftur enn sokkar, gjørdir úr nylon. Í USA vita teir um, at júst hetta hevur bjargað mangari kvinnu frá bilvanlukku.

AT amerikanskir granskarar eru komnir til tað úrslit, at AT fleiri menn enn kvinnur gerast sínnissjúkir.

Finn orð fyri myndirnar, tak fyrstu bókstavirnar burtur úr, og tú fært navnið á nógv umrøddum Afrikulandi:



tíðari smádeilan millum hjún ikki er so vandamikil, meðan hvassir samanbrestir nógv oftari føra til skilnað.